


# Føroyar mítt land

Brá úr Føroya søgu frá 9. øld og til okkara dagar kundi felagsheitið verið fyri tær fimm sendingarnar í røðini "Føroyar mítt land" í vikuni, ið fór, har vit fyrst hoyrdu um fróðarmannin Andrias Weihe, um Portugalstrolararnar, sum komu til Føroya í 1959, um Skúvoyarsteinarnar, sum kanska eru eini 1200 ára gamlir, um ta søguligu altartalvuna í Oyndafjarðar kirkju og um tann illa gitna Stóradóm, sum kom í gildi í Føroyum miðskeiðis í 16. øld. Janus Mohr, Olaf Olsen, Símun W. Arge, Freydis Poulsen og Arne Thorsteinsson løgdu sendingarnar til rættis hesa vikuna, og høvi verður sum vanligt at endurhoyra tær sunnudagin.

Rás2, sunnudagin 13. juli kl. 13.00

**Føroyar mítt land í næstu viku:**

Mánadagin 14. juli: Turið Sigurðardóttir

Týsdagin 15. juli: Janus Mohr

Mikudagin 16. juli: Anja Andreasen

Hósdagin 17. juli: Maria Jacobsen

Fríggjadagin 18. juli: Eirikur Lindenskov

# Oljufeløg í toppinum

Fortune hevur gjøt upp, hvørjar heimsins størstu fyritøkur eru í løtuni. Í ovara enda á listanum, sum telir heilar 500 fyritøkur, eru serliga oljufeløg, bilaframleiðarar og handilsketur.

Verður mált eftir umsetninginum er amerikanska ketan Walmart ovast við 378,8 milliardum dollarum. Beint í hølunum á teimum kemur Exxon Mobil við 372,8 milliardir dollarar, og víðari í røðini koma Shell, BP, Toyota og Chevron.

Hóast Walmart hevur størsta umsetningin, so kemur tað neyvan óvart á, at oljufeløgini hava størri avlop. Til dømis er avlopið hjá Exxon fýra ferðir so stórt sum hjá Walmart.

Fremsta danska fyritøkan á listanum er A.P. Møller.

